**Bárður á Steig Nielsen**
**Magnus Rasmussen**
**Edmund Joensen**
**Kaj Leo Holm Johannesen**
**Bjørn Kalsø**
**Magni Laksáfoss**
**vegna Sambandsflokkin**

Løgtingið

**Løgtingsmál nr. 105/2015: Uppskot til samtyktar um at tryggja samkyndum og øðrum neyðug borgarlig rættindi**

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Løgtingið heitir á landsstýrið um skjótast gjørligt at fyrireika og leggja lógaruppskot fyri Løgtingið, ið tryggjar samkyndum og øðrum neyðug borgarlig rættindi, tó uttan at hetta verður gjørt í hjúnabandslógini, og uttan at tað verður lóggivið inn í kirkju/trúarsamfeløg.

**Viðmerkingar:**
Málið um at tryggja samkyndum neyðug borgarlig rættindi hevur skapt spjaðing í tjóðini. Spjaðingin hevur serliga staðist av, at ætlanin er at lóggeva gjøgnum hjúnabandslógina og harvið møguliga at lóggeva inn um kirkjugátt.

Fyri at tryggja samkyndum og øðrum neyðug borgarlig rættindi og samstundis tryggja samanhaldið í føroysku tjóðini verður tí hervið heitt á landsstýrið um at leggja lógaruppskot fyri tingið, ið tryggjar samkyndum og øðrum neyðug borgarlig rættindi. Tó uttan at hetta verður gjørt í hjúnabandslógini, og uttan at tað verður lóggivið inn í kirkju/trúarsamfeløg.

Í sambandi við lógarsmíðið eigur at verða settur ein politiskur fylgibólkur, umboðandi allar flokkar á tingi, ið hevur sum aðalmál at sameina alla politisku skipanina um henda spurningin.

Uppskotið eigur at vera klárt skjótast gjørligt. Miðað eigur at verða eftir, at uppskotið er klárt í seinasta lagi 1. desember 2016.

**Á Løgtingi, 16. mars 2016**

| | | |
|---|---|---|
| Bárður á Steig Nielsen | Magnus Rasmussen | Edmund Joensen |
| Kaj Leo Holm Johannesen | Bjørn Kalsø | Magni Laksáfoss |